Heilsumálaráðið

Dagfesting:	07.03.2024
Mál nr.:	23/10433-49
Málsviðgjørt:	GMM/BL
Ummælistíð:	2.-30. januar 2024
Eftirkannað:	07.02.2024

Uppskot til

Løgtingslóg um broyting í løgtingslóg um almenna heilsutrygd (Heilsutrygdarlógin)
(Undantak fyri gjaldskyldu, afturgjaldsreglur, heimild til innheinting av skuld o.a. og nágreinan av, hvussu tilskotið skal roknast, tá ið ein fyllir 18 ár og tá ið ein verður pensjónistur ella fyritíðarpensjónistur í tilskotstíðarskeiðinum)

§ 1

Í løgtingslóg nr. 178 frá 22. desember 2009 um almenna heilsutrygd (Heilsutrygdarlógin), sum seinast broytt við løgtingslóg nr. 159 frá 20. desember 2023, verða gjørdar hesar broytingar:

1. § 18, stk. 7 og 8 verða orðað soleiðis:
"*Stk. 7.* Um ein persónur fyllir 18 ár í tíðarskeiðinum, verður tilskotið roknað eftir stk. 6 fram til tíðarskeiðið endar.
Stk. 8. Um ein persónur verður pensjónistur ella fyritíðarpensjónistur í tíðarskeiðinum, verður tilskotið roknað eftir stk. 2 og 3 fram til tíðarskeiðið endar."

2. Yvirskriftin yvir § 24 verður orðað soleiðis:
"Gjald til Heilsutrygd"

3. Í § 24 verður aftan á stk. 1 sum nýtt stk. sett:
"*Stk. 2.* Persónar, sum eru fevndir av stk. 1, men sum rinda heilsutrygdargjald í øðrum Norðanlandi vísandi til Nordisk Konvention om social sikring, og sum ikki kunnu draga gjaldið frá, vísandi til skattalógina, kunnu eftir umsókn verða undantiknir gjaldskyldu sambært stk. 1. Undantøkan hevur virknað frá tí degi, umsóknin er móttikin. Tá ið umsøkjarin ikki longur rindar heilsutrygdargjald í øðrum Norðanlandi, hevur hann skyldu at boða Heilsutrygd frá hesum."
Stk. 2 og 3 verða eftir hetta stk. 3 og 4.

4. Í § 24 verður sum stk. 5 sett:
"*Stk. 5.* Landsstýrisfólkið kann áseta nærri reglur um viðurskifti viðvíkjandi umsókn og fráboðanarskyldu sambært stk. 2."

5. Í § 26 verður aftan á 1. pkt. sum nýtt pkt. sett:

"Til nýtslu í sambandi við umsókn um gjaldsundantøku sambært § 24, stk. 2, kann Heilsutrygd útvega sær upplýsingar frá øðrum viðkomandi myndugleikum, undir hesum TAKS."

6. Í § 26 verða sum stk. 2 og 3 sett:
"*Stk. 2.* Hevur persónur givið Heilsutrygd skeivar upplýsingar ella tagt um umstøður, sum hava týdning fyri gjaldsundantøku sambært § 24, stk. 2, kann Heilsutrygd eftirfylgjandi krevja inn gjaldið, ið viðkomandi av órøttum ikki hevur goldið.
Stk. 3. Rindar ein persónur, ið er fevndur av løgtingslógini, ikki gjaldið smbrt. stk. 2 innan ásettu freist, verður rentutilskriving framd. Rentutilskrivingin er 0,7% fyri hvønn byrjaðan mánað. Sama er galdandi fyri skuldskrivaða rentu."

7. Aftan á § 26, men áðrenn yvirskriftina yvir § 27, verður sett:

"*Innheinting av skuld*

§ 26 a. Heilsutrygdargjald, renta og innheintingarkostnaður smbrt. § 26, ið er fallið til gjaldingar, kann verða innheintað við panting.
Stk. 2. TAKS fremur panting fyri heilsutrygdargjald, skuldskrivaða rentu og innheintingarkostnað eftir stk. 1 eftir reglunum fyri innkrevjing av skattum, tó er § 7, stk. 1 í lov for Færøerne om inddrivelse af skatter og afgifter til det offentlige m.m. ikki galdandi.
Stk. 3. TAKS fær heimild at innkrevja skuld og innkrevjingarkostnað sambært hesi løgtingslóg við at afturhalda í A-inntøku hjá teimum gjaldskyldugu sambært reglunum um hetta í skattalógini."

§ 2

Stk. 1. § 1, nr. 1 kemur í gildi dagin eftir, at henda løgtingslóg er kunngjørd.
Stk. 2. § 1, nr. 2-7 koma í gildi 1. juli 2024.

Kapittul 1. Almennar viðmerkingar

1.1. Orsakir til uppskotið

Endamálið við hesum lógaruppskoti er yvirskipað at fremja tvær broytingar.

Tann eina broytingin er at fáa samsvar ímillum Heilsutrygdarlógina og Nordisk Konvention om Social Sikring viðvíkjandi heilsutrygdargjaldi. Sambært lógaruppskotinum kunnu borgarar, ið rinda heilsutrygdargjald í øðrum Norðanlandi og sum ikki kunnu fáa frádrátt vísandi til skattalógina, við umsókn fáa undantak fyri at rinda heilsutrygdargjald. Hinvegin missir borgarin ikki rættindi til at fáa veitingar sambært § 1 í lógini.

Tann seinna broytingin er at broyta tilvísingarnar í § 18 í heilsutrygdarlógini, soleiðis at samsvar er millum ásetingarnar í § 18 og telduskipanina hjá Apoteksverkinum, ið útroknar heilivágstilskot.

Undantak fyri gjaldskyldu v.m.

Sambært Nordisk Konvention om Social Sikring hevur ein borgari ikki skyldu at rinda til sosiala skipan í meira enn einum landi, sum er fevnt av konventiónini. Um føroyingur tí rindar til aðra sosiala skipan sum t.d. Folketrygd í Norra, hevur hann ikki eisini skyldu til at rinda heilsutrygdargjald í Føroyum. Hetta er í andsøgn við galdandi heilsutrygdarlóg, sum í § 24 ásetur, at øll, ið hava fylt 18 ár, og sum eru fevnd av lógini, gjalda 175 kr. um mánaðin umframt 0,70 % av skattskyldugu inntøku sínari til Heilsutrygd. Heilsutrygd hevur fylgt heilsutrygdarlógini og sostatt kravt heilsutrygdargjald sambært løgtingslógini; t.v.s. eisini frá borgarum búsitandi í Føroyum, sum arbeiða og rinda til sosiala skipan í øðrum Norðanlandi.
Henda mannagongd hjá Heilsutrygd bleiv kærd til táverandi Kærunevnd í almanna- og heilsumálum, sum í november 2014 kom til ta niðurstøðu, at ein norðurlendingur sambært konventiónini bert kann verða kravdur eftir heilsutrygdargjaldi í einum limalandi, meðan tað sambært kærunevndini er ógreitt, eftir hvørjari limalandslóg gjald skal krevjast. Kærunevndin heimvísti tí málið til nýggja viðgerð. Heilsutrygd boðaði táverandi Heilsu- og innlendismálaráðnum frá, at Heilsutrygd tók avgerðina hjá kærunevndini til eftirtektar, men metti samstundis, at talan var um eitt heldur fløkt mál. Ósamsvar er millum heilsutrygdarlógina, sum Heilsutrygd umsitur og norðurlendsku konventiónina, og harvið eisini í hvønn mun viðkomandi borgarar hava rætt til at krevja inngoldna peningin aftur frá Heilsutrygd.

§ 18 í heilsutrygdarlógini

Í sambandi við broytingar, gjørdar í § 18 í heilsutrygdarlógini í 2023, hevur ivamál tikið seg upp, um hvussu § 18, stk. 7 og stk. 8 skulu skiljast. Apoteksverkið hevur upplýst, at skipanin hjá teimum, ið útroknar heilivágstilskot, er forritað soleiðis, at ein persónur verður verandi í einum tilskotsári, inntil tilskotsárið er liðugt. Hetta er eisini galdandi, tá ið ein persónur fyllir 18 ár ella gerst pensjónistur ella fyritíðarpensjónistur mitt í einum tilskotsári. Tað vil siga, at støðan hjá hesum persónum broytist ikki, fyrr enn tey byrja uppá eitt nýtt tilskotsár.

Eftir at heilsutrygdarlógin varð broytt í 2023 er tað greitt, at samsvar ikki er ímillum § 18, stk. 7 og 8 í heilsustrygdarlógini og praksis hjá Apoteksverkinum. Tá ið heilsutrygdarlógin varð broytt í 2023, var ikki ætlanin at gera broytingar í útrokningini av heilivágstilskoti, og tí er hendan broyting í lógini ikomin ótilætlað.

Við hesum lógaruppskoti verður § 18, stk. 7 og 8 rættað til, soleiðis at samsvar er ímillum heilsutrygdarlógina og skipanina hjá Apoteksverkinum, ið roknar tilskotið fyri tilskotsheimilaðan heilivág.

1.2. Galdandi lóggáva
Sambært § 24 í Heilsutrygdarlógini skulu øll, sum eru fylt 18 ár, og sum eru fevnd av lógini. gjalda 175 kr. um mánaðin umframt 0,70 % av skattskyldugu inntøku sínari til Heilsutrygd. Heilsutrygd hevur fylgt heilsutrygdarlógini og sostatt kravt heilsutrygdargjald sambært lógini; t.v.s. eisini frá borgarum búsitandi í Føroyum, sum arbeiða og rinda til sosiala skipan í øðrum Norðanlandi. Í galdandi løgtingslóg er ongin heimild hjá Heilsutrygd at gera undantak frá gjaldskylduni. Hetta er ikki í samsvar við Nordisk Konvention om social sikring, og tí er neyðugt við lógarbroyting í heilsutrygdarlógini.

Sambært § 18, stk. 6 í galdandi heilsutrygdarlóg gjalda børn og ung yngri enn 18 ár onki egingjald. Persónar millum 18 ár og pensjónsaldur gjalda egingjald samsvarandi ásetingunum í § 18, stk. 3, pkt. 1-4, sí niðanfyri:

1) 40% av tí partinum av útreiðslunum, sum er yvir 967 kr. og upp til 1.574 kr.
2) 60% av tí partinum av útreiðslunum, sum er oman fyri 1.574 kr. og upp til 3.148 kr.
3) 75% av tí partinum av útreiðslunum, sum er oman fyri 3.148 kr. og upp til 6.296 kr.
4) 100% av tí partinum av útreiðslunum, sum fer upp um 6.296 kr.

Pensjónistar og fyritíðarpensjónistar gjalda egingjald samsvarandi § 18, stk. 5, pkt. 1-4, sí niðanfyri:

1) 40% av tí partinum av útreiðslunum, sum er yvir 967 kr. og upp til 1.974 kr.
2) 60% av tí partinum av útreiðslunum, sum er oman fyri 1.974 kr. og upp til 2.500 kr.
3) 75% av tí partinum av útreiðslunum, sum er oman fyri 2.500 kr. og upp til 2.800 kr.
4) 100% av tí partinum av útreiðslunum, sum fer upp um 2.800 kr.

§ 18, stk. 7 og 8 eru soljóðandi:
"*Stk. 7.* Um ein persónur fyllir 18 ár í tíðarskeiðinum, verður tilskotið roknað eftir stk. 2 og 3 fram til tíðarskeiðið endar.
Stk. 8. Um ein persónur verður pensjónistur ella fyritíðarpensjónistur í tíðarskeiðinum, verður tilskotið roknað eftir stk. 4 og 5."

Sum omanfyrinevnt var ikki ætlanin at gera broytingar í útrokningini av heilivágstilskoti, tá ið heilsutrygdarlógin varð broytt í 2023. Neyðugt er tí at gera broyting í heilsutrygdarlógini.

1.3. Endamálið við uppskotinum
Yvirskipaða endamálið við lógaruppskotinum er at fáa samsvar millum Heilsutrygdarlógina og Nordisk Konvention om Social Sikring. Við lógaruppskotinum kunnu føroyingar, ið gjalda til sosiala skipan í øðrum Norðanlandi, ið er fevnt av Nordisk Konvention om social sikring, søkja Heilsutrygd um at sleppa undan gjaldskylduni í § 24 í galdandi Heilsutrygdarlóg, men missa tó ikki rættindi til at fáa veitingar sambært § 1 í lógini.

Endamálið við lógaruppskotinum er harumframt at fáa samsvar millum § 18, stk. 7 og 8 í heilsutrygdarlógini og praksis hjá Apoteksverkinum. Tá ið heilsutrygdarlógin varð broytt í 2023, varð ikki ætlanin at gera broytingar í útrokningini av heilivágstilskoti. Við hesum lógaruppskoti verður § 18, stk. 7 og 8 rættað til, soleiðis at samsvar er ímillum heilsutrygdarlógina og skipanina hjá Apoteksverkinum, ið roknar tilskotið fyri tilskotsheimilaðan heilivág.

1.4. Samandráttur av nýskipanini við uppskotinum

Løgtingið hevur samtykt at fylgja Nordisk Konvention om social sikring, og tí er tað eisini av stórum týdningi, at føroyska lóggávan verður tillagað soleiðis, at hon samsvarar við millumlanda sáttmálan. Við lógaruppskotinum kann ein føroyingur, ið arbeiðir í einum Norðanlandi, ið er fevnt av Nordisk Konvention om social sikring, søkja um gjaldsundantøku frá § 24 í heilsutrygdarlógini. Hetta er ikki gjørligt við verandi lóggávu, og tí er ósamsvar millum Heilsutrygdarlógina og Nordisk Konvention om social sikring ið sigur, at ein borgari bert hevur skyldu til at rinda til sosiala skipan í einum landi.

Apoteksverkið hevur upplýst, at skipanin hjá Apoteksverkinum, sum roknar tilskot til tilskotsheimilaðan heilivág, er forritað soleiðis, at ein persónur verður verandi í einum tilskotsbólki, til tilskotsárið endar, hóast hann hevur føðingardag ella verður pensjónistur ella fyritíðarpensjónistur í tilskotsárinum. Tá ið heilsutrygdarlógin varð broytt í 2023, varð ikki ætlanin at gera broytingar í útrokningini av heilivágstilskoti. Við hesum lógaruppskoti verður § 18, stk. 7 og 8 rættað til, soleiðis at samsvar er ímillum heilsutrygdarlógina og praksis hjá Apoteksverkinum.

1.5. Ummæli og ummælisskjal

Lógaruppskotið hevur verið til ummælis hjá:
Aðalráðunum, Heilsutrygd, Almannaverkinum, Læknafelagi Føroya, Kommunulæknafelagi Føroya, Serlæknafelagi Føroya, Felagnum fyri Yngri læknar, Felagnum Føroyskir Sjúkrarøktarfrøðingar, Føroyskum Sálarfrøðingum, Fysioterapeutfelagi Føroya, Ergoterapeutfelaganum, Ljósmøðrafelagi Føroya, Føroyskum Radiografum, Vinnuhúsinum, TAKS, Kærustovni Føroya, Áhugafelagnum Antares, Føroya Skipara- og Navigatørfelagi, Føroya Fiskimannafelagi, Føroya Handverkarafelagi.

Broytingarnar viðv. § 18 í heilsutrygdarlógini hava ikki verið til hoyringar hjá viðkomandi hoyringarpørtum. Broytingarnar eru tó partvíst gjørdar í samráði við Apoteksverkið.

TAKS mælir til at innheintingarkostnaður eigur eisini at verða nevndur í § 26a, stk. 1, 2 og 3. Eisini mælir TAKS til, at tað aftast í § 26 a, stk. 2 eigur at verða sett: “ , tó er § 7, stk. 1 í lov for Færøerne om inddrivelse af skatter og afgifter til det offentlige m.m. ikki galdandi”. Við hesi orðing verður tryggjað at panting ikki neyðturviliga skal fremjast innan 2 ár, men innanfyri vanligu fyrningarfreistina.
Viðmerking: Heilsumálaráðið tekur viðmerkingarnar til eftirtektar.

Fíggjarmálaráðið hevur ikki viðmerkingar til sjálvan lógartekstin ella serligu viðmerkingarnar, men nakrar formligar viðmerkingar til uppskotið. Undir 2.11 stendur at lógaruppskotið ikki hevur ásetingar um skattir og avgjøld, hóast heilsutrygdarlógin er ein avgjaldslóg, og undir 2.12 um gjøld stendur, at lógaruppskotið heimilar, at undantak kann gerast frá gjaldskravinum. Heilsutrygdargjaldið verður rópt eitt gjald, men talan er í roynd og veru er um eitt avgjald.
Viðmerking: Heitið heilsutrygdargjald verður ikki broytt til avgjald í hesum lógaruppskotinum.

Uttanríkis- og vinnumálaráðið hevur ongar viðmerkingar til lógaruppskotið.

Áhugafelagið Antares fegnast um at Heilsutrygdarlógin verður broytt, so hon er meira í samsvar við Norðurlandasáttmálan um sosiala trygd.

Heilsutrygd mælir til, Heilsumálaráðið ansar eftir orðaljóðinum í § 24, stk. 5. soleiðis, at heimildin er greið til at at gera reglur og mannagongdir fyri umsóknir og skjalprógv. Serliga hevur tað týdning, at tað ber til at seta krøv um skjalprógv, og at tað skal bera til at brúka Vangan – ella møguliga krevja, at umsøkjarar søkja talgilt við Vanganum.
Viðmerking: Heilsumálaráðið metir, at heimildin í § 24, stk. 5, ið er soljóðandi "Landsstýrisfólkið kann áseta nærri reglur um viðurskifti viðvíkjandi umsókn og fráboðanarskyldu sambært stk. 2." er nóg greið.

Almanna- og mentamálaráðið tekur undir við ætlaðu broytingunum og fegnast um, at lóggávan verður meira í samsvari við millumlandasáttmálar.

Vinnuhúsið hevur ongar viðmerkingar til lógaruppskotið.

Almannaverkið tekur undir við ætlanini um at broyta lógina soleiðis, at hon verður meira í samsvari við Nordisk Konvention om Social Sikring.

Umhvørvismálaráðið hevur ongar viðmerkingar til lógaruppskotið.

Kapittul 2. Avleiðingarnar av uppskotinum

2.1. Fíggjarligar avleiðingar fyri land og kommunur

Tað er trupult at meta nágreiniliga um, hvørjar fíggjarligar avleiðingar lógaruppskotið hevur fyri Heilsutrygd og partvíst eisini fyri TAKS. Hetta orsaka av, at tað í skrivandi stund ikki er møguligt at siga, hvussu nógvir føroyingar fara at søkja um undantak fyri at gjalda heilsutrygdargjald.

Heilsutrygd hevur mett um fíggjarligu avleiðingarnar av uppskotinum til omanfyri nevndu lógarbroyting við støði í upplýsingum frá TAKS. Samlaða metingin vísir, at fíggjarligu avleiðingarnar av lógarbroytingini fara at verða umleið 3 mió. kr árliga.

Metingin er grundað á talið av føroyingum, sum arbeiða á sjógvi og landi í Norra. Tað eru eisini føroyingar í øðrum Norðanlondum, men nógv teir flestu arbeiða í Norra. Heilsutrygd metir, at um allir føroyingar umborð á norskum skipum frameftir søkja um at verða undantiknir gjaldskyldu til Heilsutrygd, hevur tað væntandi við sær eina lækking í heilsutrygdarinngjøldum á umleið 2 mió. kr. árliga.

Søkja allir føroyingar, sum arbeiða í Noregi á landi ella umborð á skipi, um at verða undantiknir gjaldskyldu til Heilsutrygd, vísa metingarnar, at tað hevur við sær eina lækking í inngjøldunum á umleið 3. mió. kr. árliga.

Heilsutrygd væntar, at tað fer at krevja umleið eitt ársverk at umsita og viðgera umsóknir um undantak fyri at rinda heilsutrygardargjald, og tann samlaði kostnaðurin av hesum er umleið 550.000-600.000 kr árliga.

TAKS hevur upplýst, at fyri at umsita undantøkini í lógini er neyðugt at Heilsutrygd mennir eina skipan, har teir persónar, sum skulu vera umfataðir av undantøkunum, verða skrásettir og hvat tíðarskeið, undantakið er galdandi fyri. TAKS skal hava atgongd til hesa skrá, og skipanirnar hjá TAKS skulu síðan lagast til at taka hædd fyri hesum undantøkum. Umframt hetta er neyðugt at Heilsutrygd ger upp og skrásetir møgulig krøv, har persónar av órøttum hava fingið undantak og skulu gjalda innaftur. Hesi krøv skulu síðan sendast til TAKS at heinta inn. TAKS metir, at menningararbeiðið, sum stovnurin skal gera, kann leysliga metast til 300.000 kr.

Mett verður ikki, at broytingarnar í § 18 í heilsutrygdarlógini hava fíggjarligar avleiðingar fyri Apoteksverkið.

2.2. Umsitingarligar avleiðingar fyri land og kommunur

Lógaruppskotið hevur umsitingarligar avleiðingar við sær fyri Heilsutrygd og TAKS.

Um Heilsutrygd skal málsviðgera umsóknir um at sleppa undan at rinda heilsutrygdargjald, hevur tað nógv fyrisitingarligt arbeiði við sær, og fer tað at krevja meira starvsfólkaorku. Tað er torført at meta um, hvussu nógv arbeiði verður í hesum. Tað veldst m.a. um, hvussu nógvir borgarar fara at søkja um undantøku, og hvussu nógv arbeiði verður úr hvørjari umsókn. Tað kann t.d. hugsast, at sami persónur frá tíð til aðra skal verða undantikin heilsutrygdargjaldi. Við hesum fyritreytum, og teimum óvissum sum eru, væntar Heilsutrygd, at tað fer at krevja umleið 1 ársverk at umsita.

TAKS skal umsita undantøkini í lógini, eins og TAKS skal heinta krøv inn, har persónar av órøttum hava fingið undantak fyri gjaldskyldu.

Lógaruppskotið hevur ongar fyrisitingarligar avleiðingar fyri Apoteksverkið við tað, at telduskipanin longu verður umsitin samsvarandi teimum ætlaðu lógarbroytingunum.

2.3. Avleiðingar fyri vinnuna
Lógaruppskotið hevur ta avleiðing fyri vinnuna, at persónar fevndir av § 24, stk. 2, eftir umsókn kunnu sleppa undan at rinda heilsutrygdargjald í Føroyum.

2.4. Avleiðingar fyri umhvørvið
Lógaruppskotið hevur ongar avleiðingar fyri umhvørvið.

2.5. Avleiðingar fyri serstøk øki í landinum
Lógaruppskotið hevur ikki avleiðingar fyri serstøk øki í landinum.

2.6. Avleiðingar fyri ávísar samfelagsbólkar ella felagsskapir
Lógaruppskotið hevur ta jaligu avleiðing, at persónar ið eru fevndir av § 24, stk. 2 eftir umsókn kunnu sleppa undan at rinda heilsutrygdargjald í Føroyum.

2.7. Millumtjóðasáttmálar á økinum
Lógaruppskotið hevur við sær, at samsvar verður fingið millum heilsutrygdarlógina og Nordisk Konvention om social sikring.

2.8. Tvørgangandi millumtjóðasáttmálar
1) Hoyvíkssáttmálin
Uppskotið hevur ongar avleiðingar fyri Hoyvíkssáttmálan.

2) Evropeiski mannarættindasáttmálin, EMRS
Uppskotið hevur ongar avleiðingar við atliti at EMRS.

3) Sáttmáli Sameindu Tjóða um rættindi hjá einstaklingum, ið bera brek
Uppskotið hevur ongar avleiðingar við atliti at Sáttmála Sameindu Tjóða um rættindi hjá einstaklingum, sum bera brek.

2.9. Markaforðingar
Lógaruppskotið strikar eina markaforðing við tað at samsvar fæst millum heilsutrygdarlógina og lóggávuna í hinum Norðanlondum.

2.10. Revsing, fyrisitingarligar sektir, pantiheimildir ella onnur størri inntriv
Lógaruppskotið hevur ikki ásetingar um revsing ella fyrisitingarligar sektir. Lógaruppskotið hevur áseting í § 26 a um, at heilsutrygdargjald og renta, ið er fallin til gjaldingar, kann verða innheintað við panting. Harumframt verður heimilað TAKS í § 26 a, stk. 3 at innkrevja skuld og innkrevjingarkostnað sambært hesi løgtingslóg við at afturhalda í A-inntøku hjá teimum gjaldskyldugu.

2.11. Skattir og avgjøld
Lógaruppskotið hevur ikki ásetingar um skattir og avgjøld.

2.12. Gjøld
Lógaruppskotið hevur ongar ásetingar um gjøld, men heimilar at undantak kann gerast frá gjaldskravinum.

2.13. Áleggur lógaruppskotið likamligum ella løgfrøðiligum persónum skyldur?
Lógaruppskotið áleggur ikki likamligum ella løgfrøðiligum persónum skyldur.

2.14. Leggur lógaruppskotið heimildir til landsstýrisfólkið, ein stovn undir landsstýrinum ella til kommunur?
Lógaruppskotið leggur heimildir til landsstýrisfólkið. Landsstýrisfólkið kann áseta nærri reglur um viðurskifti viðvíkjandi umsókn og fráboðanarskyldu sambært § 24, stk. 2.

2.15. Gevur lógaruppskotið almennum myndugleikum atgongd til privata ogn?
Lógaruppskotið gevur ikki almennum myndugleikum atgongd til privata ogn.

2.16. Hevur lógaruppskotið aðrar avleiðingar?
Mett verður ikki, at lógaruppskotið hevur aðrar avleiðingar enn tær, sum eru nevndar omanfyri.

2.17. Talvan: Yvirlit yvir avleiðingarnar av lógaruppskotinum

	Fyri landið ella landsmyndug-leikar	Fyri kommunalar myndugleikar	Fyri pláss ella øki í landinum	Fyri ávísar samfelags-bólkar ella felagsskapir	Fyri vinnuna
Fíggjarligar ella búskaparligar avleiðingar	Ja	Nei	Nei	Ja	Nei
Umsitingarligar avleiðingar	Ja	Nei	Nei	Ja	Nei
Umhvørvisligar avleiðingar	Nei	Nei	Nei	Nei	Nei
Avleiðingar í mun til altjóða avtalur og reglur	Ja	Nei	Nei	Ja	Nei
Sosialar avleiðingar	[redacted]		Nei	Ja	[redacted]

Kapittul 3. Serligar viðmerkingar

3.1. Viðmerkingar til ta einstøku greinina

Til § 1

Til nr. 1.
§ 18, stk. 7 í galdandi heilsutrygdarlóg er soljóðandi:
"Stk. 7. Um ein persónur fyllir 18 ár í tíðarskeiðinum, verður tilskotið roknað eftir stk. 2 og 3 fram til tíðarskeiðið endar."

Apoteksverkið hevur upplýst, at skipanin hjá Apoteksverkinum, sum roknar tilskot til tilskotsheimilaðan heilivág, er forritað soleiðis, at ein persónur verður verandi í einum tilskotsbólki, til tilskotsárið endar, hóast hann hevur føðingardag í tilskotsárinum. Hetta er ikki í samsvar við galdandi § 18, stk. 7.

Fyri at fáa samsvar ímillum lógina og telduskipanina hjá Apoteksverkinum, verður § 18, stk. 7 broytt, soleiðis at lógin vísir til § 18, stk. 6 í staðin fyri til § 18, stk. 2 og 3.

Í ávísum førum kann ein persónur gerast fyritíðarpensjónistur, tá ið viðkomandi fyllir 18 ár. Hesin persónur verður fevndur av § 18, stk. 7 og rindar sostatt ikki egingjald sambært stk. 6, fram til tíðarskeiðið endar.

Galdandi § 18, stk. 8 í galdandi heilsutrygdarlóg er soljóðandi:
Stk. 8. Um ein persónur verður pensjónistur ella fyritíðarpensjónistur í tíðarskeiðinum, verður tilskotið roknað eftir stk. 4 og 5.

Apoteksverkið hevur upplýst, at skipanin hjá Apoteksverkinum, sum roknar tilskot til tilskotsheimilaðan heilivág, er forritað soleiðis, at ein persónur verður verandi í einum tilskotsbólki, til tilskotsárið endar, hóast hann hevur føðingardag í tilskotsárinum. Hetta er ikki í samsvar við galdandi § 18, stk. 8.

Fyri at fáa samsvar ímillum lógina og praksis hjá Apoteksverkinum, verður § 18, stk. 8 broytt, soleiðis at lógin vísir til § 18, stk. 2 og 3 í staðin fyri til § 18, stk. 4 og 5.

Til nr. 2.
§ 24
Í galdandi Heilsutrygdarlóg er yvirskriftin yvir § 24: "*Gjald fyri*". Orðingin er ikki røtt, og verður við hesum lógaruppskoti rættað til: "*Gjald til Heilsutrygd* ".

Til nr. 3.
§ 24, stk. 2
Sambært hesari áseting kunnu persónar, sum eftir § 24 stk. 1, hava skyldu til at rinda heilsutrygdargjald í Føroyum, men sum rinda heilsutrygdargjald í øðrum Norðanlandi vísandi til Nordisk Konvention om social sikring, eftir umsókn sleppa undan gjaldskyldu.

Orsøkin til, at krav verður sett um, at borgari skal senda inn umsókn, er, at tað er borgarin sjálvur, ið hevur vitanina um, hvar hann rindar heilsutrygdargjald. Heilsutrygd hevur ikki hesa vitanina. Undantøkan hevur virknað frá tí degi, umsóknin er móttikin.

Tá ið ein persónur ikki longur rindar heilsutrygdargjald í øðrum Norðanlandi, hevur viðkomandi skyldu til at boða Heilsutrygd frá hesum.
Stk. 2 og 3 verða eftir hetta stk. 3 og 4.

Til nr. 4.
§ 24, stk. 5
Landsstýrisfólkið ásetir nærri reglur um viðurskifti viðvíkjandi umsókn og fráboðanarskyldu. Landsstýrisfólkið fær hervið heimild til at áseta reglur um mannagongdir í sambandi við umsókn og fráboðanarskyldu sambært § 24, stk. 2.

Til nr. 5.
§ 26, stk. 1
Í annað punktum í § 26 verður sett áseting um, at Heilsutrygd til nýtslu í sambandi við umsókn um gjaldsundantøku sambært § 24, stk. 2, kann útvega sær upplýsingar frá øðrum viðkomandi myndugleikum, undir hesum TAKS.

Til nr. 6.
§ 26, stk. 2
Í § 26, stk. 2 verður sett áseting um, at um ein persónur hevur givið Heilsutrygd skeivar upplýsingar ella tagt um umstøður, sum hava týdning fyri gjaldsundantøku sambært § 24, stk. 2, kann Heilsutrygd eftirfylgjandi krevja inn gjaldið, ið viðkomandi av órøttum ikki hevur goldið. Gjaldið kann krevjast við at afturhalda løn v.m. eftir reglunum um innkrevjing av persónligum skatti.

§ 26, stk. 3
Í § 26, stk. 3 verður ásett, at um ein persónur, ið er fevndur av lógini, ikki rindar gjaldið innan ásettu freist, verður rentutilskriving framd. Rentutilskrivingin er 0,7% fyri hvønn byrjaðan mánað. Sama er galdandi fyri skuldskrivaða rentu. Tað vil siga, at um ein persónur, ið er undantikin at rinda heilsutrygdargjald, ikki uppfyllir treytirnar fyri undantøku, verður her ásett heimild til at upprætta krav og rentutilskriving, um kravið ikki verður goldið til tíðina. Í § 26, stk. 2 verður renturokningin fyri almenn krøv nýtt. Rentulógin verður ikki nýtt. Grundgevingin fyri hesum er, at tá tað er TAKS, sum innheintar skuldina, verður kravið lagt inn í innkrevjingarskipanina hjá TAKS, og har er rentusatsurin líka fyri øll almenn krøv.

Til nr. 7.
§ 26 a
Nýggj grein 26 a verður sett inn í lógina og yvirskriftin til greinina verður "*Innheinting av skuld*". Í greinini verða ásettar reglur um innheinting av heilsutrygdargjaldi umframt rentu við panting.

Til § 2.
Stk. 1.
Lógarbroytingin um § 18 í heilsutrygdarlógini kemur í gildi dagin eftir, at lógin er kunngjørd.
Stk. 2.
Lógarbroytingarnar um undantak fyri gjaldsskyldu, afturgjaldsreglur og heimild til innheinting av skuld o.a. koma í gildi 1. juli 2024.

Heilsumálaráðið, 7. mars 2024

Margit Stóra
landsstýriskvinna

/ Bjørgfríð Ludvig

Yvirlit yvir fylgiskjøl:
Fylgiskjal 1: Javntekstur
Fylgiskjal 2: TAKS
Fylgiskjal 3: Fíggjarmálaráðið
Fylgiskjal 4: Uttanríkis- og vinnumálaráðið
Fylgiskjal 5: Antares
Fylgiskjal 6: Heilsutrygd
Fylgiskjal 7: Almanna- og mentamálaráðið
Fylgiskjal 8: Vinnuhúsið
Fylgiskjal 9: Almannaverkið
Fylgiskjal 10: Umhvørvismálaráðið